# Miniralputur – undurverk fyri húðina

Javnari, reinari, natúrligari og betri fyri húðina. Hesi eru lovorðini, sum standa at lesa allastaðni, har miniralputur verður umrøtt.

Miniralputur er eitt fantastiskt og slóðbrótandi slag av foundation, sum er eitt fínt og lætt putur, tú verður púra bitin av. Tað virkar næstan sum eitt nýtt og fínt lag av perfektari húð, sum sær púra ósmikað og natúrlig út á tær.

Næstan øll make-up merki hava sína egnu røð av miniralssminku við eygnaskuggum, kinnareyðum og puturi, ið er nógv tann best umtókta vøran.

Tey flestu, sum brúka miniralsminku, eru samd um, at tað er sera gott og lætt at brúka. Men tað krevur eitt lítið sindur av venjing at leggja javnt á húðina. Tí skalt tú brúka eina serliga tætta og stutthærda bust, og leggja putrið á við masserandi rundum rørslum.

## Natúrlig miniralir

Ektað miniralsminka inniheldur bara reinar natúrligar miniralar, og onki silikon ella talk er blandað í. Vanligastu miniralini eru bismuth oxyklorid, titaniumdioxid, zinkoxid og mica, sum hava hvør sín eginleika.

Titaniumdioxid og zinkoxid verja húðina móti sólini, og zinkoxid er eisini gott fyri viðbrekna húð.

Bismuth oxyklorid ger, at putrið heldur sær leingi á húðini og mica gevur vakra litin.

Ein stórur fyrimunur við miniralsminku er, at hon inniheldur ikki so nógv ymisk sløg av tilfari, ið sum kunnugt økja um vandan fyri ovurviðkvæmi.




Í meiri enn 30 ár hevur miniralsminka verið partur av loynidóminum hjá stóru stjørnunum og gimsteinurin í beauty-boxini hjá víðagitnum stylistum. Men nú kunnu vit vanligu deyðiligu tíbetur eisini keypa miniralsminku.

Miniralputur hevur eftir fáum árum avloyst øll onnur sløg av putri og foundation.

*Lagt til rættis:*
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*